# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*»We at B36 are pleased to notice a substantial number of visitors from Malta, Turkey and other European countries…«*

*Braneggjaður heimasíðuvertur á www.b36.fo eftir lutakasti til Europa-Cup*

*Reglur hjá ÍSF fyri dómsnevndir innan ÍSF*
*»Avgerðir hjá dómsnevndini eru endaligar og kunnu ikki broytast av øðrum myndugleika enn Ítróttadómstóli ÍSF«*

*Reglur hjá FSF fyri dómsnevndir innan ÍSF*
*»Avgerðir hjá dómsnevndini eru endaligar og kunnu ikki broytast av øðrum myndugleika, t.d. aðalfundi, tó undantikið avgerðir, ið reka feløg ella einstaklingar úr ÍSF«*

# FSF vil ikki loyva dómstólinum framat

**Seinasti leikurin í Páll M. Joensen málinum tykist vera í stríð við ÍSF-lógirnar, sum FSF annars virkar undir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Staðfestingarnar í reglunum hjá ÍSF og FSF eru ymiskar, hóast hesar snúgva seg um júst somu nevndir. Og hetta tykist vera stóri knúturin, nú FSF hevur sent ÍSF bræv, har FSF mælir frá, at Ítróttardómstólurin skal viðgera málið um Páll M. Joensen.



*Politiski leikurin um Páll M. Joensen-málið tykist langt ífrá vera liðugur enn. Seinasti leikurin er, at FSF biður Ítróttadómstólin um at síggja burtur frá málinum*

### Reglurnar eru enn ikki broyttar

Hóast FSF soleiðis ikki hevur dagført viðtøkurnar fyri dómsnevndina, síðani Ítróttardómstólurin varð settur á stovn fyri fáum árum síðani, so er neyvan ivi um, at tað enn eru reglurnar hjá ÍSF, sum FSF virkar undir.

Dagføringar í hesum sambandi eru ávegis. FSF hevur samtykt nýtt lógarverk, sum at kalla ger upp við bygnaðin, sum higartil hevur verið galdandi innan ÍSF. Tær lógirnar fáa gildi frá 1. januar komandi, og til ta tíð ætlar ÍSF eisini at broyta sínar viðtøkur, soleiðis at stríð ikki verður millum ymsu sersambondini um, hvussu ÍSF eigur at virka.

Men hóast føroyingar í hesum døgum hava tosað nógv um visjón 2015, so eru vit enn ikki komin til 1. januar 2007. Og tí kann FSF illa bera seg undan, at tað framhaldandi er ÍSF, sum hevur seinasta orðið í føroyskum fótbólti.

### Fótfinta ella styrkisroynd

Men eftir øllum at døma er tað júst hetta, sum FSF vil hava. Við ikki at vilja útflýggja Ítróttardómstólinum skjøl úr málsviðgerð síni, setir FSF seg beinleiðis ímóti, at nakar ítróttarinstansur skal vera hægri enn FSF sjálvt.

Spurningurin er so, hvørt talan er um fótfintu, sum hevur til endamáls at grugga málið um Páll M. Joensen, ella hvørt talan er um eina endaliga styrkisroynd mótvegis ÍSF.

### Sleppa prinsippum upp á fjall

Eitt er, hvørt talan er um solorenning, fótfintu ella bara politikk. Annað – og helst eins týdningarmikið – er, at FSF við hesum snøgt sagt noktar feløgum at testa tesurnar, sum FSF hevur um mál og málsviðgerð av ymsum slag.

Higartil hevur málið um Páll M. Joensen púra greitt gingið eftir fordømum. Púra rætt skuldu vit kanska lagt afturat, tí hvørki kappingarella dómsnevnd meta seg vanliga hava heimild at fara inn at broyta mannagongd, tá talan er um prædecensdómar.

Tí skal tað júst vera ein slíkur dómstólur, sum tekur slíka avgerð – um hon skal takast. Og fyri bæði HB og føroyskan fótbólt hevur tað væl áhuga at fáa staføest, hvørt galdandi umsiting av lógarverkinum er røtt ella ikki.

# Dómstólurin skal ikki viðgera kappingarmál

**Óli Holm, FSF-forseti, sigur, at seinasta snaringin í Páll M. Joensen-málinum als ikki merkir, at FSF ikki viðurkennir Ítróttardómstólin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Hetta málið snýr seg als ikki um nakað stríð millum FSF og ÍSF. Tað snýr seg um, at vit ikki meta dómstólin hava nakað at gera við kappingarmál. Tað er ein støða, sum vit alla tíðina hava havt, og í fjør gjørdu vit vart við júst somu viðurskifti, tá B36 ætlaði sær at senda inn kæru, tá teir vórðu dømdir at tapa dyst í steypakappingini.

Soleiðis sigur Óli Holm, nú FSF í skrivi til ÍSF hevur sagt, at tey ikki meta, at ítróttardómstólurin skal hava nakað at siga í málinum um spæliloyvið hjá Páll M. Joensen. Eitt skriv, sum FSF hevur sent, eftir at dómstólurin hevur heitt á FSF um at útflýggjað skjøl í sambandi við málsviðgerðina.

Og FSF-forsetin leggur dent á, at hetta einki hevur við eini vantandi virðing fyri ítróttardómstólinum at gera.

– Tað, sum vit alla tíðina hava skilt við Ítróttardómstólinum, er, at hesin bara skal taka støðu um prinsipiel mál, sum hava týdning fyri reglur og lógir. Dómstólurin arbeiðir ikki undir nakrari tíðarfreist, og tí er vónleyst, um hesin eisini skal viðgera kærur, sum hava við kappingar at gera. Tað kann jú hugsast, at mál tá verða viðgjørd, langt eftir at kappingarnar eru liðnar, og tá ber ikki til at broyta útfallið á hesum.

### Vilja ikki nokta

Reglurnar hjá Ítróttardómstólinum staðfesta, at dómstólurin einsamallur ger av, hvørt mál skulu takast upp ella ikki. Merkir útsøgnin hjá Óla Holm saman við skrivinum so, at FSF ikki ætlar at útflýggja skjøl, hóast tvíhildið verður um, at tey skulu útflýggjast?

– Tað ger tað ikki. Hevur Ítróttardómstólurin framhaldandi ta fatan, so mugu tey biða Dómsnevndina um skjølini. Vit hava bara víst á, at vit avgjørt ikki meta, at hetta er eitt mál, sum eigur at viðgerast av einum Ítróttardómstóli, staðfestir Óli Holm.

## Dómstólurin skal tala

– So leingi vit hava verandi skipan innan føroyskan ítrótt, so kann eingin seta seg yvir ítróttardómstólin.

Somikið avgjørdur er Heðin Mortensen, ÍSF-forseti, tá hann verður spurdur, hvørt FSF hevur heimild til ikki at vilja góðkenna ítróttardómstólin.

Og hann er skjótur at leggja afturat, at tað bara er dómstólurin sjálvur, sum ger av, hvørji mál skulu takast upp.

– Tað er nevndin í hesum, sum púra suverent ger av, hvørji mál verða tikin upp. Ein og hvør – limafelag ella persónur – hava rættin at kæra. Men tað er dómstólurin sjálvur, sum ger av, hvørji mál verða viðgjørd, sigur Heðin Mortensen, sum í løtuni er staddur uttanlands, og sum tí enn ikki hevði sett seg í allar smálutir í mállinum.

**-mørk**

## FSF eigur eisini dómstólin

»…og okkum vitandi hevur einki fótbóltsfelag, sóiðani núgaldandi kappingerreglur fyri fótbólt vórðu samtyktar, nakrantíð gjørt galdandi, at avgerðir hjá dómsnevndini ikki skulu verða endaligar.«.

Somikið greið er staðfestingin, sum umsitingin hjá FSF hevur sent ÍSF. Ein staðfesting, sum millum annað hevur við sær, at FSF ikki hevur útflýggjað ítróttardómstólinum málsviðgerðina av málinum um Páll M. Joensen.

Tað er tó ikki heilt rætt, tá sagt verður, at føroyskur fótbóltur ikki hevur góðkent ítróttardómsólin sum verandi eitt slag av hægstarætti fyri føroyskan ítrótti – eisini fótbólt.

### Upprunin úr fótbóltinum

Fyrst og fremst, so stavar ítróttardómstólurin beinleiðis frá fótbóltsheiminum. Hetta tá tað í 1981 var almikið rok um, hvørt MB ella LÍF skuldu flyta upp í táverandi 1. deild. Tað málið endaði til seinast í rættinum sum sivilt sakarmál, og tað var ein støða, sum ítróttarheimurin fyri alt í verðini vildi sleppa undan. Tí varð síðani farið undir at smíða eitt lógarverk fyri ítróttardómstólin. Føroyski ítróttarheimurin var tó ikki heilt búgvin til hetta, og tí varð uppskotið ikki lagt til endaliga samtykt í 80'unum.

Uppskotið er tó seinni samtykt. Ikki minst, tí eitt mál úr fótbóltsheiminum skapti trýst á ein slíkan instans. Hetta tá B36 førdi eitt sera prinsipielt mál allan vegin til dómsnevndina, hóast teir – sambært formanninum í felagnum – vóru væl vitandi um, at dómsnevndin ikki fekk gjørt nýggjan úrskurð í málinum. Hetta prógvaði tó, at ynskið um ítróttardómstól framvegis var til staðar, og síðani er ein slíkur eisini samtyktur av aðalfundinum.

Og eisini her hevur FSF havt sín leiklut. Umvegis umboðan á stjórnarfundi, so hevur FSF verið við til at leggja uppskotið fyri aðalfundin, og á aðalfundinum hava føroysku fótbóltsfeløgini hvør í sínum lagi eisini møguleika at siga sína hugsan. Sum vit hava skilt tað, so varð uppskotið tó einmælt samtykt, tá hetta var fyri, og tí ber helst illa til hjá fótbóltinum nú at siga, at ongar avgerðir enn tær hjá FSF verða góðtiknar av føroyskum fótbólti.

**-mørk**